# Plys til børnini

**Niels og Peter Plys fara at undirhalda børnunum í Tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum. Áskránni eru gandur, ballónir og annað undirhald**




BØRN
*Eyðun Klakstein*

Børnini hava eisini okkurt at fara til á ólavsøku. Í Tjaldinum, sum fer at standa í Kommunuskúlagarðinum, fara Niels og Peter Plys.

Hóast teir líkjast, so eru teir ikki í familju, men teir brúka hóast alt sama eftirnavn.

Niels Plys hevur áður vitjað í Føroyum við sínum undirhaldi, og tá var hann væl umtóktur millum børnini. Hann dugir gandakynstur, kann fáa ballónir at líkjast øðrum enn ballónum, og so hevur hann góðgæti við í skjáttuni.

Tá eru vánirnar fyri at verða populerur millum børnini á góðari leið.

Undirhaldið Plyssunum verður í Tjaldinum í Kommunuskúlagarðinum bæði ólavsøkuaftan og ólavsøkudag. Báðar dagarnar klokkan 17.00.

**Hvussu heldur tú ólavsøku?**

## Bara tað ikki regnar


*Leivur Hansen, sjónvarpsmaður*

– Eg skal arbeiða ein part av Ólavsøkuni. Seinnapartin Ólavsøkudag skal eg til arbeiðis, so tann dagin verður ikki tann nógvi hugnin. Annars plagar Ólavsøkan at vera tað vanliga. Ein túr í býin at práta við fólk, ganga oman og niðan, tað er tað vanliga. Kanska man so støkkur inn á gólvið at vitja onkran eisini.

Eg plagi eisini at hyggja eftir kappróðri, og í ár er tað rættuliga spennandi, tí Havnar Róðrarfelag hevur møguleika til at ogna sær fýra FM heiti, og tað er mær vitandi fyrstu ferð í søguni. So tað hevði verið stuttligt, og um so Havnarbáturin eisini vinnur, so hevði Ólavsøkan verið bjargað.

Veðrið hevur eisini nógv at siga – um ikki alt. So um vit sjálvi gera okkara til, at Ólavsøkan verður góð, og tað ikki regnar, so verður hon uttan iva góð.

**Hvussu heldur tú ólavsøku?**

## Fái vitjan úr Grønlandi


*Sólja í Ólavsstovu, aðalstjóri í Almannaráðnum*

– Eg ælti mær fyrst og fremst at halda frí frá arbeiðnum á ólavsøku. Eg fái vitjan úr Grønlandi, og tað fer sjálvsagt at merkja ólavsøkuna. Tey hava hoyrt nógv um ólavsøkuna, so í ár hava tey lagt sær feriuna soleiðis, at tey kunnu uppliva hana.

Eg havi búð nógv ár í Grønlandi, men eg havi næstan altíð verið heima á ólavsøku, tí tað er tá, at tú kanst hitta flest fólk.

Eg ælti at lata gestirnar hjá mær uppliva ólavsøkuna, og eg fari ivaleyst til setanina, kappróður og til felagssangin – tað eru tey stóru tiltøkini, sum mann altíð fer til.














